## Fáa fleiri nøvn

Í mong ár hava donsk foreldur valt at geva sínum børnum eitt fornavn afturat eftirnavninum, men hesin siðurin er eftir øllum at døma við at hvørva nú. Blaðið JydskeVestkysten skrivar, at alt fleiri børn fáa trý, fýra ella fimm fornøvn umframt eftirnavnið. Ein prestur, sum blaðið hevur tosað við, sigur, at av teimum meiri enn 40 børnunum, sum hann hevur doypt tað seinasta árið, vóru bara tvey, sum høvdu eitt fornavn.



## 950 fáa sekkin

Amerikanska flogfelagið United Airlines, sum er tað næststørsta í USA, er í álvarssomum trupulleikum, og sum eina roynd at sleppa burtur úr teimum hevur leiðslan gjørt av, at 950 starvsfólk skulu fáa sekkin. Hetta er aðru ferð, at United Airlines boðar frá uppsangum, og fyrru ferð var talan um 1.600 starvsfólk. Leiðslan í UA sigur við blaðið Times, at eins og fyrru ferð er tað tað dýra brennievnið til flogførini, sum er orsøk til uppsagnirnar.



*Barbara á Tjaldrafløtti greiddi frá teimum verkætlanunum, sum landsstýrið tók lut í í fjør*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Betra um sjótrygd í Indonesia

**Landsstýrið brúkti í fjør 3,5 milliónir krónur til menningarhjálp, men ætlanin er so líðandi at hækka játtanina, tó at tað gongur long tíð, áðrenn málið upp á 0,7 prosent av BTÚ – sum í dag svarar til 84 milliónir – er nátt**

MENNINGARHJÁLP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Síðani lógin um altjóða menningarsamstarv varð samtykt í mai í fjør, hevur verið arbeitt miðvíst á økinum. Og í fjør var landsstýrið við í sjey verkætlanum.

ST mælir ídnaðarlondum til at lata 0,7% av BTÚ til menningarsamstarv, men í meðal er hetta talið tó bert 0,47. Hetta er tó munandi meiri enn tey 0,03%, sum Føroyar lata.

Landsstýrið hevur sett eina nevnd at ráðgeva í menningarsamstarvsspurningum, og í henni sita Marita Rasmussen, forkvinna, stjóri í Vinnuhúsinum, Snorri Brend, næstformaður, blaðmaður, Lars Tostrup, stjóri í Norrønt Atlantssamstarv, Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur, og Óluva Niclasen, deildarleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Nevndin hevur havt sjey fundir, har hon hevur viðgjørt umsóknirnar, sum landsstýrið hevur fingið, og gjørt síni tilmæli.

Peningurin verður allur nýttur til verkætlanirnar, tí einki verður nýtt til umsiting av hesi játtanini.

- Vit hava valt at veita peningin gjøgnum sjálvbodnar felagsskapir, sum vit hava fult álit á. Á tann hátt sleppa vit undan at byggja upp eina stóra umsiting, men kunnu veita peningin trygt gjøgnum sonevndar NGO'arar (Non Governmental Organization), sigur Høgni Hoydal, sum umsitir menningarhjálparmál.



*Tað er Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkismálum, sum umsitir menningarsamstarv*
Mynd: Jens Kristian Vang

### Sjey verkætlanir

Sum nevnt hevur landsstýrið valt at stuðla sjey verkætlanum í fjør. Ein lítil millión er latin til Indonesia, har peningurin er markaður til trygd á sjónum.

Helmingurin at peninginum fer til beinleiðis trygd umborð á bátunum, eitt nú skulu bátarnir fáa bjargingarbeltir. Hin helmingurin fer til at menna fiskivinnumarknaðin. Tað er hjálparfelagsskapurin Mercy Corps, sum umsitur hesa verkætlanina fyri landsstýrið.

Ein onnur verkætlan er í Kenya, har landsstýrið játtaði 20.000 krónur at upplýsa um HIV/AIDS. Hetta verður gjørt á ein øðrvísi hátt við tað at upplýsingin verður framd gjøgnum ein fótbóltsskúla. Umsóknin til hetta tiltak er komin frá Oluf Mortensen í Havn, sum er føroyski venjarin í hesi verkætlan.

Ein triðja verkætlan er í Kongo, har smáar 500.000 krónur vórðu játtaðar til at byggja 110 hús fyri. Hesi skulu nýtast til at húsa flóttafólkum, sum venda heim aftur til landið.

900.000 krónur vórðu játtaðar til skúla í Liberia gjøgnum ABC-barnahjálpina í Føroyum. Skúlin skal byggjast í býnum Monrovia, og ætlanin er, at hesin skal húsa 500 næmingum.

Eisini hevur landsstýrið játtað 400.000 krónur til World Food Programme, sum á hvørjum ári sendir út áheitan á lond um at stuðla, har sum hungursneyð rakar. Í ár mælti WFP føroyum til at stuðla eini verkætlan í Senegal.

Ein onnur skúlaverkætlan er í Tanzania, har landsstýrið játtaði einari umsókn og læt 42.000 krónur til verkætlanina. Hartil játtaði landsstýrið saman við australsku stjórnini 650.000 krónur í ein grunn, sum Heimsbankin umsitur, ið skal stuðla Palau oyggjunum í at byggja upp eina oljuumsiting.

Aftrat hesum kann nevnast, at umsitingin í 2006 játtaði at luttaka í einari bróstmjólkaverkætlan við einari millión. Her er trupulleikin tann, at pulvurmjólka framleiðarar rinda møðrum pening fyri ikki at geva bróstmjólk, men heldur geva børnunum pulvurmjólk.

Umframt meningarsamstarv læt landsstýrið eisini 550.000m krónur í beinleiðis neyðhjálp. 150.000 fóru til mat til flóttafólk í Darfur, 150.000 til mat og aðra neyðsynjarhjálp í Peru og 250.000 krónur til Bangladesh eftir ódnina Sidr.